

Betri Pensjón P/F

# Hálvársfrásøgn 2018

Interim Report 1H 2018





# Innihaldsyvirlit


| | |
|---|---|
| 5 ára yvirlit | 5 |
| Leiðslufrágreiðing | 6 |
| Rakstrarroknskapur 1. januar – 30. juni | 7 |
| Fíggjarstøða | 8 |
| Eginognsuppgerð | 10 |
| Notur | 11 |
| Leiðsluátekning | 12 |
| Partafelagsupplýsingar | 13 |


betri
betri
betri
betri
betri betri betri
betri

# 5 ára yvirlit

| DKK 1.000 | 1H 2018 | 1H 2017 | 1H 2016 | 1H 2015 | 1H 2014 |
|---|---|---|---|---|---|
| **Høvuðstøl** | | | | | |
| **Rakstur** | | | | | |
| Tryggingargjøld | 73.806 | 72.879 | 58.441 | 54.212 | 48.898 |
| Tryggingarveitingar | -18.347 | -15.893 | -13.477 | -12.614 | -8.882 |
| Úrslit av íløguvirksemi | 5.915 | 9.400 | 11.391 | 26.124 | 28.749 |
| Rakstrarkostnaðir av tryggingarvirksemi | -5.848 | -5.558 | -8.166 | -7.485 | -9.064 |
| Úrslit av endurtrygging | -311 | -257 | -308 | -339 | -256 |
| Tryggingartekniskt úrslit | 192 | 115 | -649 | -2.639 | -398 |
| Tryggingartekniskt úrslit av sjúkra- og vanlukkutr. | 1.429 | 351 | 823 | 233 | 610 |
| Ársúrslit | 2.048 | 1.798 | 1.434 | 4 | 2.374 |
| **Fíggjarstøða** | | | | | |
| Avsetingar til tryggingar- og íløguavtalur í alt | 1.164.219 | 1.047.756 | 910.916 | 806.023 | 703.467 |
| Eginogn í alt | 71.551 | 65.662 | 39.349 | 43.473 | 41.639 |
| Ognir í alt | 1.241.384 | 1.117.114 | 953.034 | 856.011 | 755.155 |
| **Lyklatøl** | | | | | |
| **Lyklatøl fyri kostnaðir og váðar** | | | | | |
| Kostnaðir í % av tryggingargjøldum | 7,9% | 10,5% | 14,0% | 13,8% | 18,1% |
| Kostnaðir í % av avsetingum | 0,5% | 0,8% | 0,9% | 1,0% | 1,3% |
| Kostnaðir fyri hvønn tryggjaðan | 343 kr. | 499 kr. | 563 kr. | 613 kr. | 1.210 kr. |
| Kostnaðarúrslit | -0,1% | -0,3% | -0,3% | -0,4% | -0,8% |
| Váðaúrslit | 0,3% | 0,3% | 0,7% | 0,9% | 0,8% |
| **Lyklatøl fyri konsolidering** | | | | | |
| Ognarkapitalstig | 6,1% | 6,3% | 4,3% | 5,4% | 5,9% |
| Yvirfulnaðarstig | 486,3% | 307,3% | 93,8% | 141,0% | 37,3% |
| Solvensdekningur | 257,7% | 247,8% | 143,1% | 154,9% | 144,3% |
| **Lyklatøl fyri renting** | | | | | |
| Renting av eginogn áðrenn skatt | 3,5% | 4,0% | 4,5% | 0,0% | 7,2% |
| Renting av eginogn eftir skatt | 2,9% | 3,3% | 3,7% | 0,0% | 5,9% |
| Renting av fíggjarognum | 0,5% | 0,9% | 1,3% | 3,3% | 7,2% |

# Leiðslufrágreiðing

## Eigaraviðurskifti

Betri Pensjón P/F rekur pensjóns- og lívstryggingarvirksemi á føroyska marknaðinum.

Felagið varð stovnað í 2006 og fór undir virksemi í 2007. Felagið er tí framvegis ungt og í framhaldandi menning.

Betri P/F er móðurfelag hjá Betri Pensjón P/F, og eigur allan partapeningin í felagnum.

## Úrslitið fyri fyrra hálvár 2018

Tryggingargjøldini, íroknað innskot, vuksu frá 73,1 mió. kr. í fyrra hálvári 2017 til 74,1 mió. kr.

Fíggjarmarknaðirnir góvu eitt avkast fyrra hálvár 2018 uppá 5,9 mió.kr. móti 9,4 mió. kr. í fyrra hálvári 2017.

Tryggingarveitingarnar vuksu úr 15,9 mió. kr. fyrra hálvári 2017 í 18,3 mió. kr.

Rakstrarútreiðslurnar vóru 5,8 mió. kr. ímóti 5,6 mió. kr. fyrra hálvár 2017.

Rakstrarúrslitið eftir skatt gjørdist 2,0 mió. kr. móti 1,8 mió. kr. í fyrra hálvári 2017.

Úrslitið fyri tíðarskeiðið verður mett nøktandi.

## Viðmerkingar til fíggjarstøðuna

Fíggjarstøðan hjá Betri Pensjón P/F øktist frá 1.189,2 mió. kr. til 1.241,4 mió. kr. í fyrra hálvári 2018. Avsetingarnar fyri Unit Link sáttmálar øktust frá 1.100,8 mió. kr. til 1.155,3 mió. kr.

Eginognin tann 30. juni 2018 var 71,6 mió. kr.

## Váðar, ið kunnu ávirka úrslitið

Betri Pensjón P/F metir váða at fevna um øll viðurskifti, ið kunnu hava negativa ávirkan á møguleikar felagsins at røkka síni handilsligu mál. Betri Pensjón P/F nýtir væl skipaðar mannagongdir fyri at stýra váðanum. Eisini hevur nevndin ásett umfatandi, yvirskipaðar leiðreglur, sum stjórn og leiðsla annars alsamt halda eyga við verða hildnar.

Marknaðarváðin er váðin fyri, at dagsvirði á ognum felagsins broytast orsakað av broyttum marknaðarviðurskiftum so sum rentu, kursi v.m. Fyri Betri Pensjón P/F er marknaðarváðin størsti fíggjarligi váðin. Hesin váði verður avmarkaður við at tryggja hóskandi karmar fyri rentuváða fyri lánsbrøv, saman við eini varisligari íløguætlan fyri partabrøv. Felagið avmarkar eisini marknaðarváðan við at grunda virksemi sítt á Unit Link tryggingar, har kundarnir bera allan íløguváðan av egnum íløgum. Marknaðarváðin er undir neyvum eftirliti.

Teir tryggingarligu váðanir eru knýttir at gongdini í deyðstíttleika, avlamistíttleika v.m. Hækkandi livialdur økir veitingar felagsins til eftirlønir, meðan tal av andlátum og sjúkrameldingum ávirka veitingar í sambandi við deyða og sjúku. Av tí at felagið í høvuðsheitum hevur lagt seg eftir Unit Link tryggingum, har eftirlønin hjá kundanum er knýtt at teirri íløgustrategi, hann sjálvur hevur valt, eru tryggingarligu váðarnir avmarkaðir.

Felagið kann vera fyri fíggjarligum tapi vegna operationellan váða. Hesin kann eisini skaða umdømi felagsins. Operationellir váðar fevna um váða fyri tapi vegna feil í KT-skipanum, løgfrøðiligum ósemjum, ikki nøktandi ella skeivum mannagongdum ella sviki.

Felagið avmarkar operationellan váða við innaneftirliti og funktiónsskilnaði. Hetta verður alsamt endurskoðað og dagført. Fyri at tryggja, at prísir og tænastustøði eru kappingarfør, fylgir felagið neyvt við marknaðargongdini. Stórur dentur verður lagdur á góða kundatænastu, opinleika og gjøgnumkygni í samskiftinum við kundan.

## Vónir fyri 2018

Við árslok 2017 varð mett, at raksturin fyri 2018 fór at geva eitt avlop millum 2 og 6 mió.kr. Hildið verður fast við hesa meting.

## Serligar hendingar

Frá degnum fyri fíggjarstøðuna til í dag eru ongar týðandi hendingar farnar fram, sum ávirka metingina av hálvársfrásøgnini fyri 2018.

# Rakstrarroknskapur

| Nota | DKK 1.000 | 1H 2018 | 1H 2017 |
|---|---|---|---|
| | **Tryggingargjøld fyri egna rokning** | | |
| | Tryggingargjøld brutto | 74.117 | 73.136 |
| | Endurtryggingargjøld | -311 | -257 |
| | **Tryggingargjøld fyri egna rokning í alt** | **73.806** | **72.879** |
| | **Íløguvirksemi** | | |
| | Rentuinntøkur og vinningsbýti | 18.366 | 26.214 |
| | Virðisjavningar | -11.001 | -14.837 |
| | Rentuútreiðslur | -10 | -15 |
| | Fyrisitingarkostnaður í sambandi við íløguvirksemi | -1.440 | -1.962 |
| | **Úrslit av íløguvirksemi í alt** | **5.915** | **9.400** |
| | **Tryggingarveitingar** | | |
| | Útgoldnar veitingar | -18.607 | -15.041 |
| | Broyting í avsetingum til endurgjøld | 260 | -852 |
| | **Tryggingarveitingar fyri egna rokning í alt** | **-18.347** | **-15.893** |
| | **Broyting í avseting til Unit Link sáttmálar** | **-54.457** | **-58.987** |
| | **Rakstrarkostnaður av tryggingarvirksemi** | | |
| | Útveganarkostnaður | -1.688 | -1.747 |
| | Fyristingarkostnaður | -4.160 | -3.812 |
| | **Rakstrarkostnaður av tryggingarvirksemi fyri egna rokning í alt** | **-5.848** | **-5.558** |
| | Flutt úrslit av íløguvirksemi | -877 | -1.727 |
| | **Tryggingartekniskt úrslit** | **192** | **115** |
| | Tryggingartekniskt úrslit av sjúkra- og vanlukkutryggingarvirksemi | 1.429 | 351 |
| | Íløguúrslit av eginognini | 877 | 1.727 |
| | **Úrslit áðrenn skatt** | **2.498** | **2.193** |
| | Skattur | -450 | -395 |
| | **Ársúrslit** | **2.048** | **1.798** |

# Fíggjarstøða

## Ogn

| Nota | DKK 1.000 | 1H 2018 | 2017 |
|---|---|---|---|
| | **Immateriell ogn** | **496** | **681** |
| | **Materiell ogn** | | |
| | Rakstrargøgn | 299 | 399 |
| | **Materiell ogn í alt** | **299** | **399** |
| | **Aðrar fíggjarligar íløguognir** | | |
| | Íløguprógv | 59.459 | 46.111 |
| | Onnur útlán | 3.557 | 4.432 |
| | Innlán í kreditfeløgum | 13.116 | 23.899 |
| | **Aðrar fíggjarligar íløguognir í alt** | **76.132** | **74.442** |
| | **Íløguogn í alt** | **76.132** | **74.442** |
| | **Íløguogn tengd at Unit-Linked tryggingaravtalum** | **1.155.278** | **1.100.820** |
| | **Áogn** | | |
| | Áogn hjá tryggingartakarum | 5.322 | 3.460 |
| | **Áogn í sambandi við beinleiðis tryggingaravtalur í alt** | **5.322** | **3.460** |
| | Áogn hjá atknyttum virkjum | 113 | 0 |
| | Onnur áogn | 0 | 4.893 |
| | **Áogn í alt** | **5.435** | **8.353** |
| | **Tíðaravmarkingar** | | |
| | Rentur tilgóðar og innvunnin leiga | 53 | 98 |
| | Aðrar tíðaravmarkingar | 3.691 | 4.398 |
| | **Tíðaravmarkingar í alt** | **3.744** | **4.496** |
| | **Ogn í alt** | **1.241.384** | **1.189.191** |

| Nota | DKK 1.000 | 1H 2018 | 2017 |
|---|---|---|---|
| | **Fíggjarstøða** | | |
| | **Skyldur** | | |
| | **Eginogn** | | |
| | Partapeningur | 70.000 | 70.000 |
| | Yvirkursur við partabrævaútgávu | 35.000 | 35.000 |
| | Framflutt úrslit | -33.449 | -35.497 |
| | **Eginogn í alt** | **71.551** | **69.503** |
| | **Avsetingar til tryggingar- og íløguavtalur** | | |
| | Avsett til endurgjøld | 5.071 | 3.740 |
| | Avsett til bonus og avsláttur av tryggingargjøldum | 3.870 | 5.331 |
| | Avsett til Unit Link avtalur | 1.155.278 | 1.100.820 |
| | **Tryggingartekniskar avsetingar í alt** | **1.164.219** | **1.109.891** |
| | **Avsettar skyldur** | | |
| | Útsettur skattur | 45 | 93 |
| | **Avsetingar í alt** | **45** | **93** |
| | **Skuld** | | |
| | Skuld í samband við beinleiðis trygging | 640 | 891 |
| | Skuld til atknýtt virkir | 56 | 1.846 |
| | Skattur | 498 | 0 |
| | Onnur skuld | 4.375 | 5.756 |
| | **Skuld í alt** | **5.569** | **8.493** |
| | **Tíðaravmarkingar** | **0** | **1.212** |
| | **Skyldur í alt** | **1.241.384** | **1.189.191** |
| 1 | Nýttur roknskaparháttur | | |

# Eginognsuppgerð

| DKK 1.000 | Partapeningur | Yvirkursgrunnur | Flutt úrslit | Eginogn |
|---|---|---|---|---|
| **Eginogn 1. januar 2017** | **50.000** | **35.000** | **-41.136** | **43.864** |
| **Rørslur á eginognini í 2017** | | | | |
| Kapitalhækking | 20.000 | 0 | | 20.000 |
| Ársúrslit | | | 5.639 | 5.639 |
| **Eginogn við árslok 2017** | **70.000** | **35.000** | **-35.497** | **69.503** |
| **Eginogn 1. januar 2018** | **70.000** | **35.000** | **-35.497** | **69.503** |
| **Rørslur á eginognini í 2018** | | | | |
| Úrslit | | | 2.048 | 2.048 |
| **Eginogn 30. juni 2018** | **70.000** | **35.000** | **-33.449** | **71.551** |

# Notur til ársfrásøgnina

**Nota** **DKK 1.000**

**1** **Nýttur roknskaparháttur**

## Alment

Hálvársfrásøgnin er gjørd sambært Løgtingslóg um tryggingarvirksemi og tilhoyrandi kunngerð nr. 2 frá 30. desember 2009 um ársfrásagnir hjá tryggingarfeløgum og haldfelagsskapum (hereftir kunngerð nr. 2).

Í rakstrarroknskapinum eru gjørdar broytingar í flokking millum útveganarkostnaðir, fyrisitingarkostnaðir og fyrisitingarkostnað í sambandi við íløgur eins og gjørt var í ársfrásøgnini fyri 2017. Broytingarnar hava onga ávirkan á úrslit ella eginogn felagsins.

Eisini er broyting gjørd í flokking av kostnaði millum útveganarkostnað, fyrisitingarkostnað og kostnað í sambandi við Tryggingartekniskt úrslit av-, sjúkra- og vanlukkutryggingarvirksemi. Av somu orsøk kunnu tølini í 5 árayvirlitinum á síðu 5, eldri enn 2017 ikki samanberast við tølini fyri 2017 og 2018. Broytingarnar hava onga ávirkan á úrslit ella eginogn felagsins.

Nýttur roknskaparháttur er annars óbroyttur í mun til ársfrásøgnina fyri 2017, og verður tí víst til hesa.

Hálvársfrásøgnin er ikki grannskoðað.

### Avrunding av upphæddum

Upphæddir í rakstrarroknskapi, fíggjarstøðu og notum v.m. verða avrundað til heil tøl uttan desimalir. Av tí at tølini verða avrundað hvørt fyri seg, kunnu avrundingarmunir vera millum upplýstar samanteljingar og summin av teimum undirliggjandi tølunum.

### Um innroknan og virðisáseting í ársfrásøgnini

Ognir verða innroknaðar í fíggjarstøðuna, tá ið tað er sannlíkt, at felagið fær framtíðar fíggjarligar ágóðar, og virðið á ognunum kann gerast upp álítandi.

Skyldur verða innroknaðar í fíggjarstøðuna, tá ið tað er sannlíkt, at felagið í framtíðini skal av við fíggjarligar ágóðar, og støddin á skyldunum kunnu gerast upp álítandi.

Inntøkur verða innroknaðar í rakstrarroknskapin so hvørt, sum tær verða vunnar, harundir virðisjavningar av fíggjarligari ogn og skuld. Í rakstrarroknskapinum verða somuleiðis innroknaðar allar útreiðslur – herímillum tryggingarveitingar og broyting í avsetingum – sum eru við til at røkka ársins inntøku.

### Konsernviðurskifti og nærstandandi partar

Handil og tænastur millum feløg í samtakinum verða avgreidd til marknaðarprís ella á útreiðslunøktandi støði.

### Roknskaparligar metingar

Roknskaparliga virðið á ávísum ognum og skyldum er tengt at metingum av, hvussu hesar ognir og skyldur verða ávirkaðar av framtíðar hendingum.

### Umrokning av útlendskum gjaldoyra og kurstryggjan

Ársfrásøgnin er í donskum krónum. Upphæddir í útlendskum gjaldoyra verða støðugt umroknaðar til danskar krónur við gjaldoyrakursinum á transaktiónsdegnum.

Áogn, skuld og aðrar peningaligar upphæddir í útlendskum gjaldoyra verða umroknað til danskar krónur við gjaldoyrakursinum á degnum fyri fíggjarstøðuni. Staðfestur og ikki staðfestur vinningur ella tap frá umrokning av útlendskum gjaldoyra verður innroknað í rakstrarroknskapin undir íløguvirksemi.

### Rakstrarúrslit

Felagið hevur býtt rakstrarúrslitið fyri hálvári 2018 eftir kontributiónsmeginregluni, sum í stuttum merkir, at tey, ið eru við til at skapa úrslitið, fáa sín lut í hesum.

### Lyklatøl

Hesi eru útroknað sambært ásetingum í kunngerð nr. 2 frá 30. desember 2009 um ársfrásagnir hjá tryggingarfeløgum og haldfelagsskapum.

# Leiðsluátekning

Nevnd og stjórn hava í dag viðgjørt og góðkent hálvársfrásøgnina fyri 2018 hjá Betri Pensjón P/F.

Hálvársfrásøgnin er greidd úr hondum í samsvari við lóg um tryggingarvirksemi.

Vit meta, at nýttu roknskaparreglurnar eru hóskandi, soleiðis at hálvársfrásøgnin gevur eina rættvísandi mynd av ognum og skyldum felagsins, fíggjarligu støðuni pr. 30. juni 2018, umframt av úrslitinum av virksemi felagsins fyri tíðarskeiðið 1. januar 2018 - 30. juni 2018.

## Stjórn

**Betri Pensjón P/F**

Tórshavn, 28. august 2018

**Helgi L. Petersen**
Stjóri

## Nevnd

**Mortan Poulsen**
Nevndarformaður

**Bogi Petursson Nielsen**
Næstformaður

**Herjolvur P. Jakobsen**

**Heini Joensen**

# Partafelagsupplýsingar

**Felagið**

Betri Pensjón P/F
Skrás. nr.: P/F 4627
Roknskaparár: 12
Heimstaður: Tórshavn

**Nevnd**

Mortan Poulsen, nevndarformaður
Bogi Petursson Nielsen, næstformaður
Heini Joensen
Herjolvur P. Jakobsen

**Stjórn**

Helgi Lamhauge Petersen, stjóri

**Betri Pensjón P/F**
Yviri við Strond 2
Postsmoga 34
110 Tórshavn

Tel +298 345 700
pensjon@betri.fo
www.betri.fo